Ítróttar
Sosialurin

Nr. 94 • mikudagur • 17. mai 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Fróði hevur brotið beinið

**Fróði Benjaminsen fekk í gjár staðfest, at tað var beinbrot, sum noyddi hann av vøllinum í landsdystinum ímóti Pólandi sunnudagin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Beinbrotið hevur við sær, at miðvallarmotorurin hjá B36 og landsliðnum noyðist at halda seg burtur frá fótbólti í einar seks vikur. Og sum vera man, so var lagið á spælarunum sjálvum í botni í gjár.

– Hetta kundi ikki verið verri, og í løtuni er humørið í botni. Sjálvandi er tað slíkt, sum kann henda, men tað ger tað ikki lættari at koma ígjøgnum, fyri tað, segði Fróði Benjaminsen.

Talan er um brot niðarliga á legginum. Tíbetur tykjast liðbondini ikki at hava fingið skaða, og heldur ikki er neyðugt við gipsi, tí brotið liggur somikið væl. Men undir øllum umstøðum verður talan altso ikki um fótbólt komandi seks vikurnar.

– Eg kann helst byrja at venja á súkklu um einar tríggjar vikur, og kanska at renna um einar fimm vikur. Í so máta má eg bara syrgja fyri, at venjingarstøðan er tann best gjørliga, tá eg aftur sleppi á vøllin, staðfestir Fróði.



*– Hetta kundi ikki verið verri, og í løtuni er humørið í botni, sigur Fróði Benjaminsen, sum breyt beinið í landsdystinum ímóti Pólandi sunnudagin*

# FM-kapping í amboðsfimleiki

**Leygardagin 20. og sunnudagin 21. mai 2006, verða FM-kappingar fyri einstaklingar í amboðsfimleiki**

FIMLEIKUR
*Tíðindaskriv*

**Kappast verður í 4 deildum:** kvinnur, menn, kvinnuunglingar og mansunglingar. Kappingarnar verða í Ítrottarhøllini á Hálsi í Havn.

Fimleikararnir, sum luttaka í kappingunum, koma úr fýra ymiskum fimleikafeløgunum. Havnar Fimleikafelag, Klaksvíkar Fimleikafelag, Fimleikafelagnum Ljósið og Fimleikafelagnum Støkk.

Leygardagin 20. mai verður sokallaða 'all round' FM kappingin, tvs. har kappast verður í øllum amboðum samlað. Vinnarin er tann, sum fær flest stig tilsamans í øllum amboðum. Kappingarnar leygardagin eru samstundis undankapping til amboðsfinalurnar sunnudagin, har 6 teir bestu fimleikararnir kappast í hvørjum amboði fyri seg.

Kappast verður fyri kvinnur, í gólvi, lopi um hest og á bita, fyri menn í gólvi, lopi um hest og í ringum.

Kappingarnar byrja báðar dagarnar kl. 13.00.



*Føroyskir fimleikarar sleppa millum annað at royna seg á bitanum í FM-kappingini um vikuskiftið*

## Flogbóltskvinnur við í EM-kapping

**Føroyska kvinnulandsliðið í flogbólti fer í dag til Íslands, har tær skulu kappast við Ísland, Skotland og Cypros í EM-kapping**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kappingin byrjar fríggjadagin, tá Føroyar skulu spæla fyrsta dystin í kappingini ímóti Cypros. Spælt verður fríggja-, leygar- og sunnudagin, og vinna tey bæði fremstu liðini sær rætt til at taka lut í C-bólkinum í EM-kappingini.

Mett verður, at Cypros er væl sterkasta liðið í bólkinum, men Føroyar, Ísland og Skotland hava á leið javnt sterk lið, og tí er sera stórur spenningur um næst fremsta plássið.

Tær 12, sum verða við føroyska liðnum á ferðini eru: Helen á Lakjuni (Brøndby), Annika á Stongum (SÍ), Lena í Buð (Mjølnir), Margit G. Joensen (Mjølnir), Hjørdis Johannesen (KÍF), Angilie Johannesen (KÍF), Sólvá Heidi Dimon (TB), Sólgerð Henriksen (Dráttur), Birita Joensen (KÍF), Heidi Dam (ÍF), Rannva Dam (KÍF), Karin Mikkelsen (SÍ).

Høvuðsvenjari er Magnus Aðalsteinsson, og hjálparvenjari er Kristian Mikkelsen.

## Hjálpardómarin er vrakaður

Dómsnevndin hjá UEFA hevur avgjørt at vraka Ole Hermann Borgan sum hjálpardómara í Champions League finaluni ímillum Barcelona og Arsenal í kvøld. Hetta skrivar UEFA á heimasíðu síni.

Í staðin verður Arild Sundet hjálpardómari hjá Terje Hauge, saman við Steinar Holvik og fjórða dómaranum Tom Henning Øvrebø.

Avgerðin er tikin eftir at Borgan valdi at lata seg í eina Barcelona troyggju, tá hann luttók í einari blaðsamrøðu um finaluna. Hetta var mett at vera so óheppið, at UEFA í gjárkvøldið vrakaði Borgan frá sínum lívs dysti sum hjálpardómari.

Arild Sundet kennir væl høvuðsdómaran Hauge, ið hann hevur virkað sum hjálpardómari fyri fleiri ferðir.

**nud**